




*Uttast frá vinstru síggjast Rói Patursson, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, Jenny Petersen og Carl Johan Jensen, sum øll vara av føroyskari list og mentan. Øll eru tey samd um, at teirra starvsøki framvegis er eitt forfjónað leysingabarn í føroyskum politikki. Sambært teimum fýra er høvuðstrupulleikin, at politiski myndugleikin partvís er líkasælur og partvís førir ein tilvitaðan politikk, sum hevur til endamáls at forða fyri einum frælsum listarligum umhvørvi í Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ARRÓP!

son Dalsgarð, metir, at føroyskir politikarar als ikki hava áhuga í eini frælsari list í Føroyum.

- Tað besta kontrollið er at lata vera við at játta tann neyðuga peningin. Vit hava áður sæð, t.d. í sambandi við sjónleikin Ginusøgur, hvør hugburður valdar millum føroyskar politikarar. Og eftirhondini er trupult at koma til aðra niðurstøðu enn hana, at føroyskir politikarar eru ræddir fyri tí fríu listini, sum í síni náttúru er avbjóðandi og flytur mørk. Teir ynskja ikki eitt virkið mentunarlív, sigur formaðurin í Rithøvundafelagnum.

Jenny á Tjóðpallinum sigur, at við avmarkaðu upphæddunum megnar politiski myndugleikin at spæla listafólkini upp ímóti hvørjum øðrum.

- Tá peningurin er so lítil, roynir hvør at sæta sær sum frægast, og so kemur skjótt split í. Á hendan hátt halda politikararnir øllum niðri. Heldur hetta fram, fer tað listarliga umhvørvið at líkjast eini oyðimørk, sigur Jenny Petersen.

### Eingin politikkur

Carl Johan Jensen, rithøvundur og virkin í LISA, peikar á himmalrópandi líkasælu.

- Politikkurin er, at tað ikki skal vera nakar politikkur. Vit hava jú ongan orðaðan mentunarpolitikk í Føroyum, og tí liggur øll ábyrgdin og alt virksemi hjá teimum einstaklingum, sum hóast umstøðurnar royna at virka sum listafólk, meðan politiski myndugleikin liggur í fasta svøvni, sigur Carl Johan.

Og Rói Patursson saknar eitt grundleggjandi kjak um, hvat vit í roynd og veru vilja við føroyskari list og mentan.

- Vit síggja alskyns góð initiativ frá okkara listafólki, men ongan respons frá politiska myndugleikanum. Okkum vantar eitt politiskt kjak um, hvørt vit yvirhøvur skulu hava ein almennan føroyskan mentunarpolitikk. Tí eftirhondini tykist tað ikki so sjálvsagt, at politikarar halda seg hava ábyrgdina av einum góðum listarligum umhvørvi, metir formaðurin í Mentunargrunninum.

Lesiðniðanfyrineyðarrópini frá fýra føroyingum, sum vara av føroyskari mentan, og sum uppliva, at teirra starvsøki framvegis er eitt forfjónað leysingabarn í føroyskum politikki.

# Støvað av til serlig høvi

- Uha, so má eg skunda mær, tí hann plagar ikki at varða serliga leingi, sigur Jenny C. Petersen speiskliga, tá hon verður biðin um at siga sína hugsan um føroyskan mentanarpolitikk.

- Mentanarpolitikkurin í Føroyum plagar at varða í nakrar dagar 4. hvørt ár upp undir val. So er hann gloymdur aftur, sigur Jenny, meðan hon roynir at bøta enn ein leka inni á Tjóðpalli Føroya, sum er orsøk til, at ein frumframførsla má útsetast enn einaferð.

### Himmalrópandi inkompetansa

- Eg eri farin at halda, at vantandi mentanarpolitikkurin er úrslit av, at føroyskir politikarar ikki megna at hugsa um menniskja sum eina heild. Ofta tykist tað sum politisku loysninar eru eitt slag av eykalutum, sum skulu bøta um okkum petti fyri petti, sigur Jenny.

Hon minnir á, at eitt fjølbroytt mentanarlív hevur eina grundleggjandi ávirkan á, um menniskju trívast í einum landi ella ikki.

- Tí má tað vera útrykk fyri eina himmalrópandi politiska inkompetansu, tá mentanarliga virksemið javnt og samt verður skert, heldur Jenny

Tað ringasta við stuttskygda mentanarpolitikkinum er, at listafólk mestsum verða spæld út móti hvørjum øðrum, heldur hon.

- Eg veit ikki, um tað er ein tilvitaður máti at halda listafólkum niðri uppá. Men tað ger tað í øllum førum ikki lættari hjá okkum, at standa saman, tá við ár um ár skulu berjast um somu fáu krónur, sigur Jenny.

### Bláoygt bjartskygni

- Ikki tí, politikararnir vilja fegnir hava føroysk listafólk at framføra fyri eitt nú útlendskum gestum. Tá verða okkara listafólk tikin úr skápinum og støvað av fyri síðani at verða pakkað niður aftur, tá gestirnir eru farnir, sigur Jenny, sum ofta kennir seg hugstoytta av vantandi politisku virðingi fyri føroyskum listafólkum.

- Eg vil helst ikki enda sum ein beisk gomul kona, sum møtir sær sjálvari í hurðini á veg út. Hinvegin eri eg bangin fyri, at mítt bjartskygni viðvíkjandi umstøðunum hjá Tjóðpallinum hevur verið í so bláoygt, sigur Jenny, sum kortini skjýtur upp, at nakað av grótinum frá mongu tunlunum verður brúkt at byggja ein Tjóðpall.

- So ímeðan vit bíða eftir onkrum at húsast i, eru allir politikarar annars vælkomnir oman á Gamla Meiaríið at síggja umstøðurnar her, sigur Jenny C. Petersen við einum brosi.

**ave**

# Skelkandi líkasæla

- Hvønn mentanarpolitikk?

Carl Jóhan Jensen hyggur spyrjandi, tá hann verður spurdur, hvat hann heldur um føroyska mentanarpolitikkin seinnu árini. Sambært honum hava vit als ongan mentanarpolitikk havt í hesum landinum øgiliga leingi, og tað er í grundini ikki so løgi.

Fyri at kunna reka ein mentanarpolitikk, mást tú hava eina meining um mentan, og tað hava føroyskir politikarar ikki. At taka støðu til mentan elvir ofta til stríð, og tí halda føroyskir politikarar seg langt burtur frá tí kjakinum. Sitandi mentamálaráðharri hevur jú eisini útmerkað seg sum ein, ið skíggjar ósemjur av øllum slag, minnir Carl Jóhan Jensen á

### G! og Listastevna? – koyr á bøin

Avleiðingar av mentanarliga hugsjónarloysinum síggja og hoyra vit í orðsins sanna týdningi hvønn dag. Tað er ein av orsøkunum til, at Kringvarpið lítið og onki hevur at bjóða hyggjarum og lurtarum. Ongin veit hví, stovnarnir skuldu leggjast saman, og enn minni hvussu tað skuldi bøta um innihaldið. Sum so ofta í føroyskum politikki, bíða vit her nú bara eftir eini veruligari gølu, sum møguliga fær onkran politikara at rakna við, sær Carl Jóhan fyri sær.

Eitt er, at okkara politikarar ikki megna at orða ein miðvísan mentanarpolitikk. Verri er tað, at teir heldur ikki duga at virða listarliga dygd, tá teir beinleiðis fáa hana borðreidda, heldur Carl Jóhan

- Hví spyr ongin, hvar Listastevnan bleiv av? Har stóð tað politikararnum í boði at bjarga einum av størstu mentanarligu frambrotunum í nýggjari tíð, men teir valdu at yppa øksl. Sjálvt um hon langt síðani hevði prógvað sína dygd, hoyrdu vit bara dunið av eini larmandi politiskari líkasælu, tá stevnan fór av knóranum, sigur Carl Johan, sum stúrir fyri, at G! nú fær somu lagnu.

### Dygdin svíður

Carl Jóhan er eisini farin at óttast fyri, at vantandi politiski áhugin fyri listafólkum fer at skaða listarligu dygdina sum frá líður.

- Nógv føroysk listafólk seta sær høg mál, ongin ivi um tað. Hinvegin má tað fáa avleiðingar, at eitt listafólk allatíðina má átaka sær annað arbeiði fyri yvirhøvur at kunna liva, sigur Carl Jóhan, sum undrar seg yvir, at ongin politikari roynir at skora sær nakrar atkvøður uppá at tryggja listafólkum sømiligar umstøður.

- Vit kundu byrja við at givið eini 20 listafólkum, sum longu hava prógvað eina ávísa dygd, minstuløn í eitt áramál. Tað hevði kostað eina tvær til tríggjar milliónir, so tað átti at kunna latið seg gjørt, sigur Carl Jóhan, og vísir á, at slíkar skipanir longi hava veri í eini fastari legu í bæði Íslandi og Norra.

- Tað ger onki, um føroyskir politikarar ikki hava megnað at fingið hugskotið sjálvir – teir kunu bara lána tað frá øðrum, sum teir eru vanir, skjýtur Carl Jóhan Jensen upp.

**ave**